## Arsenal vil hava Cole

Arsenal hevur síðsta árið sóknast eftir nýggjum álopsspælara til liðið. Ofta hevur Marouane Chamakh, sum spælir fyri Bordeaux, verið nevndur, men nú vil News of the World verða við, at West Ham-framherjin, Carlton Cole, stendur ovast á ynskilistanum hjá Arsenal. Cole verður mettur at kosta góðar 100 milliónir krónur at keypa, og Arsenal skal hava fingið fyrstarætt til spælaran í summar, um hann verður seldur.



## Rangers hevur beina kós

Glasgow Rangers er nú heili 13 stig framman fyri Celtic í skotsku landskappingini, og tað skal mestsum eitt undur til, um nakar skal taka Rangers í stríðnum um gullið. Um vikuskiftið spældi Rangers á útivølli ímóti Hearts og vann tryggan 4-1 sigur. Umframt tey mongu stigini niður til næstu liðini, eigur Glasgow Rangers eisini ein dyst til góðar at spæla.







## Stuttligt at síggja

Kvinnurnar hjá SÍ, sum longu vikuna frammanundan tryggjaðu sær greipuna, tá tær vunnu føroyameistaraheitið eftir tveir FM-finaludystir ímóti TB á Eiði, gjørdu sítt til at gera finaludagin á Giljanesi leygardagin hugnaligan og stuttligan.

Tær virkaðu sum heppikór við gullparúkki og gullskjúrti, meðan tær vóru í myrkabláu spælitroyggjunum. Eftir at dupulta greipan hjá SÍ var komin til høldar, fingu vit orðið á eina teirra, Helgu Guttesen:

– Hetta var nakað heilt serligt í dag, tí vit ikki væntaðu, at tað fór at vera so lætt, tí teir blivu avhølvaðir síðsta sunnudag. Men tað var stuttligt at síggja teir spæla so gott, sum teir gjørdu í dag, sigur Helga, ið ikki heldur, at SÍ skal hugsa um at verja nøkur meistaraheiti næsta ár.

– Nei, nú hava vit vunnið alt í ár, og so má næsta ár bara verða, sum tað verður, tí tá má bara henda tað, sum henda skal. Nú skal hetta bara njótast.

**hil**

## Fegin venjari

Spælandi venjarin hjá SÍ, Ragnar í Haraldsstovu, var ovurfegin eftir FM-sigurin leygardagin, tá hann enn eina ferð kundi staðfesta, at SÍ hevur betru breiddina.

– Munurin er fyrst og fremst, at vit hava 12 mans, sum kunnu brúkast, og teir hava sínar seks ella sjey. Vit hava nógv breiðari hóp, sigur Ragnar, sum eisini heldur liðið hjá SÍ virka væl sum eina heild.

– Liðið hjá okkum er bara so væl samansjóðað, og vit høvdu sett okkum fyri, at í dag skuldu vit vísa, hvat vit vóru verdir. Vit settu í okkum, at teir hægst skuldu fáa eitt sett, men nú fingu teir einki. Tað var heilt fantastiskt.

At SÍ skuldi vinna triðja settið so sannførandi, tá tað annars ofta kann verða ein trupulleiki, fegnaðist SÍ-venjarin serliga um:

– Tað er ringt at verja seg fyri, hvat kann henda, tá tú hevur vunnið tvey sett, men vit settu okkum fyri at geva tað síðsta, og tað rakk so hjá okkum, sigur hann.

**hil**





## Jón vildi vísa meira

Eftir dystin høvdu loftmiðlarnir valt bestu spælarar í finaluni leygardagin, og hjá SÍ fall valið á Jón Joensen, sum gekk undan og tordi at sláa ígjøgnum, áðrenn restin av liðnum ordiliga var komin í gongd. Síðani fylgdu hinir eftir, og tá vendist ikki aftur.

– Eg spældi ikki so væl síðsta vikuskiftið, og tað havi eg havt ógvuliga ilt av alla vikuna. Av tí sama havi eg verið eyka uppsettur, at í dag skuldi tað vera og at nú skuldu vit vísa, hvat vit kundu, sigur Jón.

– Tað var nú, at tað skuldi sláast ígjøgnum, og tað gjørdu vit so. Hetta er eitt ótrúliga flott kappingarár, har bæði vit og kvinnurnar vinna greipuna. Tað kann ikki vera betri enn tað sama. Og nú hava vit nógv at verja komandi kappingarár, so vit mugu bara royna at koyra á víðari.

**hil**

## Teir vóru betri

Tá Mjølnir-spælararnir stóðu uppi á pallinum og tóku ímóti silvurheiðursmerkjunum, sá tað fitt út, tá spælandi venjarin hjá klaksvíkingum, Boban Ilic, valdi eg heingja heiðursmerkini um hálsin á børnunum. Hann bleiv eisini valdur til besta spælara hjá Mjølnir í finaluni.

– Sjálvandi eri eg keddur av at tapa, men tað er í lagi allíkavæl. Vit hava spælt nógvar góðar dystir í vetur, og onkur mátti so vinna. Teir vóru betra liðið í dag, og vit misbrúktu okkara møguleikar í teimum báðum fyrstu settunum, meðan vit í triðja setti mistu konsentratiónina, sigur Boban.

– Eg eri ikki øgiliga keddur, men eitt sindur. Tú skalt jú minnast til, at tað er eisini stórt at koma í hesa finaluna, og annað liðið mátti vinna. Tíverri gjørdist tað ikki okkara lið.

**hil**

## Einki riggaði

Hevarin og liðformaðurin hjá Mjølnir, Thorvald Danielsen, var vónbrotin eftir finalutapið á Giljanesi leygardagin, tí hetta var ikki tað, sum klaksvíkingarnir høvdu ætlað:

– Í dag fingu vit slett ikki spælið at koyra sum síðsta sunnudag, tá vit vunnu á teimum á Eiði. Bóltarnir, sum vit blokkaðu í hinum báðum dystunum, fóru tíverri í gólvið í dag. Vit fingu einki at koyra, meðan SÍ fekk alt at rigga, segði Thorvald.

– Tvey tey fyrstu settini fylgdu vit væl við. Í øðrum setti høvdu vit settbólt, men gjørdu servufeil, og tað eru sovorðnir býttir feilir, ið bara ikki mugu gerast í einum so týdningarmiklum dyst. Men eg má tíverri staðfesta, tí SÍ gjørdi ikki so nógvar feilir sum vit, og eftir henda dystin er tað uppiborið, at teir vinna.

**hil**